# HALDIÐ SOSIALIN



450,- um ársfjórðingin
- sparið 395,-
í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Sosialurin
ARGJAVEGUR 26 · POSTSMOGA 76 · 110-TÓRSHAVN · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ____________________

Bústaður: ____________________

Postnr.: ____________________

Bygd/býur: ____________________

Telefon nr.: ____________________

Undirskrift: ____________________

**Ókeypis**
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn



mazda

Størsta goymslan av nýggjum bilum í landinum!
Fjølbroytt úrval fyri bestu prísir

mazda 2 diesel
úr 172.700,-
íroknað skráseting og radio



mazda 3
úr 176.700,-
íroknað skráseting og radio



mazda 6
úr 198.700,-
íroknað skráseting og radio



mazda Premacy
úr 187.700,-
íroknað skráseting og fløgusp.



mazda B2500
úr 157.700,-
íroknað skráseting og fløgusp., lastinnsats, og rustviðgerð



mazda MPV
úr 278.700,-
íroknað skráseting og fløgusp.



T.d. er Mazda 6 18.000,- kr bíligari enn sama stødd av bili hjá bíligasta kappingarneytanum

BERG MOTORS
STARAVEGUR 1-3 • TEL 31 35 35 • FAX 31 77 35 • WWW.BERGMOTORS.FO




UTTAN ÚR HEIMI

# Nú ráða irakar í Irak

**Eftir 14 mánaða herseting tóku irakar í gjár við valdinum í landinum. Men mótstøðan heldur fram**

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Hetta er ein søguligur dagur, ein eydnuríkur dagur, og hetta er dagurin, sum allir irakar hava bíðað eftir. Nú kemur Irak aftur upp í altjóða samfelagið, segði irakski forsetin, Ghazi Yawar, á hátíðarhaldinum í sambandi við valdsskiftið í gjár.

Upprunaliga var ætlanin, at irakar skuldu taka við valdinum í Irak í morgin, men sambært Hoshiyar Zebari, uttanríkisráðharra, bleiv valdsskiftið framskundað fyri at tálma teimum nógvu álopunum.

Hóast irakar nú formliga hava valdið í heimlandinum, er vald teirra avmarkað. Teir kunnu ikki leggja nakrar langtíðarætlanir, og teir hava ikki ræðið á teimum umleið 160.000 útlendsku hermonnunum í landinum. Stjórnin í Bagdad hevur kortini heimild til at biðja hermenninar fara av landinum, men hon hevur gjørt greitt, at hon hevur ongar ætlanir um tað.



*Amerikanski umsitingarleiðarin í Irak, Paul Bremer, og ein shiittiskur leiðari undir hátíðarhaldinum í gjár*

*Mynd: Reuters*

### Burturflytingar

Fyribils er einki, sum bendir á, at valdsskiftið fer at gera tað meiri friðarligt í Irak. Teir seinastu dagarnar hava minst tríggir bólkar boðað frá, at teir fara at avrætta gíslar, fáa teir ikki síni krøv eftirlíkað. Ein bólkur hóttir við at avrætta tríggjar turkar, ein annar hóttir við at avrætta ein pakistana, og í gjár kunngjørdi uppaftue ein bólkur, at hann hevur burturflutt ein amerikanskan hermann. Hesin og ein annar bólkur hava kravt, at amerikanararnir skulu lata fleiri fangar leysar, annars verða gíslarnir avrættaðir.

Sunnudagin doyði ein amerikanskur hermaður, tá ein rakett rakti eina amerikanska herstøð í Bagdad. Sambært Reuters hava minst 630 amerikanskir hermenn latið lív í Irak, síðani kríggið byrjaði.

# Mjørki nýtt vápn ímóti yvirgangsmonnum

**Mjørki er tað nýggja vápnið, sum týskarar ætla at nýta ímóti yvirgangi**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í Týsklandi bera myndugleikarnir ótta fyri, at yvirgangsmenn fara at nýta rænd flogfør ímóti teimum týsku kjarnorkuverkunum. Tí hava myndugleikarnir leingi arbeitt við ætlanum um, hvussu tey átjan verkini best kunnu verjast.

Sambært blaðnum Die Welt halda teir seg nú hava funnið hyggjuráðini. Í samráð við orkufeløgini hava myndugleikarnir gjørt av at keypa nakrar stórar maskinur, sum kunnu gera mjørka. Ætlanin er so, at maskinurnar skulu leggja kjarnorkuverkini undir í mjørka, so yvirgangsmenninir ikki finna tey.

Die Welt skrivar, at tað eru kortini ikki øll, sum hava álit á mjørkanum sum vápn ímóti yvirgangi. Eitt nú heldur tað týska flogskiparafelagið lítið um hugskotið. Felagið vísir á, at við teimum nútímans navigasjónstólunum ber til at finna eitt kjarnorkuverk, sjálvt um tað er fjalt í mjørka.

# Serbia nærri Evropa

Tann hóvligi Boris Tadic vann forsetavalið í Serbia.

Serbia fer uttan iva at nærkast Evropa, nú tann hóvligi og nýskipanarhugaði Boris Tadic tekur við sum forseti. Hann fekk 54 prosent av atkvøðunum á forsetavalinum sunnudagin. Mótvalevnið, tann víðgongdi tjóðskaparmaðurin Tomislav Nikolic, fekk 45 prosent.

Undir valstríðnum legði Boris Tadic dent á, at Serbia má nærkast hinum partinum av Evropa, og at landið tí má taka fleiri stig fram ímóti demokratii og nýskipanum heldur enn at byrgja seg inni.

Boris Tadic hevur eisini sagt, at Serbia má samstarva við krígsbrotsmannadómstólin í Haag.

## Samdir um Barroso

Tað tykist nú greitt, at portugisiski forsætisráðharrin, Jose Manuel Durao Barroso, skal taka við sum formaður í ES-nevndini, tá italiumaðurin Romano Prodi leggur frá sær í heyst.

Írland hevur formansskapin í ES til tann 30. juni, og seinastu dagarnar hevur írtska stjórnin leitað eftir einum formansevni, sum øll limalondini kunnu semjast um. Portugisiskir fjølmiðlar hava fleiri ferðir sagt, at Barroso hevði boðið sær til at taka við eftir Prodi, men at hann skal hava lagt tvinnar treytir við. Tann fyrra var, at øll londini skuldu taka undir við, at hann bleiv formaður, og tann seinna treytin var, at avgerðin skal ikki elva til tjóðartingsval í Portugal.

Tann portugisiski forsætisráðharrin er ein av teimum minni kendu leiðarunum í ES-londunum. Hann tók undir við amerikanska álopinum á Irak, men hevur kortini varðveitt góð viðurskifti við Frakland og Týskland, skrivar Reuters.

## Adamkus vann

Bert hálvt annað ár eftir at hann noyddist at fara frá, er Valdas Adamkus aftur vorðin forseti í Litava.

Í fjør misti Adamkus forsetasessin til Rolandas Paksas, men hesin noyddist at leggja frá sær í apríl, eftir at tað var komið fram, at hann hevði misnýtt sítt vald. Kanningar vístu, at hann hevði havt samband við ta russisku mafiuna, og at hann eisini hevði verið í sambandi við ta russisku fregnartænastuna. Hetta hevði við sær, at tjóðartingið koyrdi hann frá.

Tí var aftur forsetaval í Litava sunnudagin, og sambært valnevndini vann Valdas Adamkus valið við 52,1 prosentum av atkvøðunum. Mótvalevni hansara var fyrrverandi forsætisráðharrin Kazimira Prunskiene úr bóndaflokkinum.

## Berlusconi tapti

Norðuritalski stórbýurin Milano hevur verið háborgin hjá italska stjórnarflokkinum Forza Italia, men so er ikki longur.

Sunnudagin var lokalval í Milano-økinum, og tá eydnaðist tað einum valevni hjá mið- og vinstraflokkunum at vinna á valevninum, sum Forza Italia og høgraflokkarnir høvdu stillað upp. Sambært valnevndini fekk valevnið hjá mið- og vinstraflokkunum 54,3 prosent av atkvøðunum, meðan valevnið hjá stjórnarflokkunum fekk 45,7 prosent.

Italski forsætisráðharrin, Silvio Berlusconi, er úr Milano, og valúrslitið sunnudagin verður roknað sum ein dyggur ósigur hjá Berlusconi. Val var í 22 landspørtum og meiri enn 100 býum sunnudagin, men valið í Milano varð roknað sum tað týdningarmesta.

## Nógv rúsevni

Higartil í ár hava norska tollvaldið og løgreglan lagt hald á meiri enn 110 kilo av heroini, og tað er tvær ferðir meiri enn alt árið í fjør, tá tollvaldið og løgreglan komu fram á góð 51 kilo av heroini.

Iver Stensrud hjá løgregluni í Oslo sigur við Aftenposten, at løgreglan hevur lagt seg eftir at tálma tí skipaða kriminalitetinum í høvuðsstaðnum, og at tað er hetta, sum hevur givið úrslit. Bara í sjálvum Oslo hevur løgreglan funnið umleið 100 kilo av heroini í ár, sigur hann. Hann ivast kortini ikki í, at nógv heroin er í Oslo, og at brotsmenninir fjala tað í nøkrum ávísum goymslum í býnum.

Sambært Iver Stensrud hava tollararnir á markinum ímillum Noregi og Svøríki eisini funnið nógv meiri heroin í ár enn í fjør. Tað sama sigur tað svenska tollvaldið hinumegin markið, skrivar Aftenposten.